## DAGSINS MEINING

# Tvinnir eru kostirnir

Tað er ein sera trupul støða, sum landsins hægstu myndugleikar eru komnir í við arbeiðssteðginum. Støðan við sambandinum millum meginøkið og teir partar av landinum, sum ikki eru landfastir, er heilt ótolandi. Sum vit vístu á her fyri tveimum døgum síðan, verður útjaðarin gísli í hvørji einastu ósemju millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Hetta kenst sjálvsagt sum sera órættvíst fyri fólk og fyritøkur í útjaðaranum. Hinvegin duga vit væl at skilja Starvsmannafelagið, tá hetta felag einfalt vísir til, at soleiðis eru nú einaferð treytirnar, al tann tíð, at vit hava grundlógartryggjaðan verkfalsrætt her í landinum. Tað ger ikki støðuna lættari, at tað í roynd og veru er almenni myndugleikin, sum hevur vrakað eitt semingsuppskot. Við hesum liggur ábyrgdin fyri ósemjuni tungt á herum fíggjarmálaráðharrans. Tað er samstundis eitt sindur órættvíst, at Starvsmannafelagið tykist vera vorðið syndabukkurin í hesi telving.

Hetta mál átti ongantíð at verið komið so langt, at arbeiðssteðgurin slapp at standa við fleiri dagar. Partarnir áttu alt fyri eitt at havt sett seg saman aftur við semingsmonnunum. Tað er nakað heilt løgið í hesum, at so skjótt annar parturin hevur vrakað eitt semingsuppskot, ja, so heldur allur dialogur uppat og nervakríggj kemur í staðin fyri samskifti. Hetta er ein primitivur samráðingarháttur, sum hoyrir fortíðini til. Henda støðan reisir eisini spurningin um leiklutin hjá semingsmonnunum. Hví fara teir ikki alt fyri eitt í holt aftur við partarnar, tá eitt semigsuppskot er vrakað? Hvat er hetta fyri ein løgin maktlogikkur, sum sigur, at teir skulu halda seg burtur, til annar parturin ella báðir eru moyrir? Her treingir veruliga til at ruddað verður upp og til ein djúptøkna nútímansgerð av føroyska arbeiðsmarknaðinum. Við galdandi avoldaðu skipan eru eingir vinnarar - bert taparar uttan mun til endaliga úrslitið annars.

Nú hevur landsstýrið so gjørt av lutvíst at steðga ósemjuni við lóg. Hetta merkir sum kunnugt, at teir starvsmenn, sum sigla við strandferðsluskipunum verða lóggivnir til arbeiðis, so samband aftur verður millum útjaðara og meginøki. Tað er væl skiljandi, at landsstýrið nú hevur mist tolið, tí tað, sum áður nevnt, eru tey somu offrini hvørja ferð og stór samfelagslig virði fara fyri skeyti. Væl skiljandi, men er tað politiskt klókt at leggja uppí ósemjuna við lóg? Og er tað klókt at gera tað á hendan heilt óvanliga hátt? Hevði tað hóast alt ikki verið skilabest at bíðað nakrar dagar afturat? Hevði tað ikki hóast alt verið skilabetri at gjørt semingsuppskotið til lóg og t.d. samstundis latið lógina verið galdandi í tvey ár? So hevði eingin vunnið og heldur eingin veruliga tapt. Tvinnir eru kostirnir í hesum máli - hvørgin er mjúkur. At lata standa til er vandamikið - at leggja uppí er ikki minni vandamikið. Men vit kunnu uttan víðari staðfesta, at samfelagið tolir ikki eina slíka ósemju í longri tíð lika so lítið, sum tað tolir hesar afturvendandi gíslatøkurnar av útjaðaranum. Hinvegin tola demokratisku spælireglurnar ikki ov nógv inntriv av hesum slagi, sum nú er fráboðað, og talan er um eitt sera hættisligt politiskt stig, sum kann fáa ógvusligar avleiðingar. Sostatt er talan um harðar valkostir hjá løgmanni og landsstýrismonnum. Heldur ikki Javnaðarflokkurin tolir ov nógv av hesum slagi av politiskum inntrivum í grundleggjandi demokratisk rættindi. Tað er øðrvísi við hinum báðum samgonguflokkunum - teirra veljarar hava helst eitt lagaligari toleransumark, tá um uppílegging í arbeiðsemjur ræður. Øll munnu innast inni vóna, at partarnir í ellivta tíma lata vit og skil ráða og koma til eina semju.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# AKSTOVAN – viðmerking til blaðgrein hjá Hera Mohr

**Jákup Jacobsen**
*stjóri*



Í grein í bløðunum í seinastu viku, undrast tygum á og biðja um eina grundgeving fyri, hví Bileftirlit Føroya hevur skift navn til Akstovan og hví búmerkið varð skift út.

Samstundis verður spurt, hví uppgávan ikki varð boðin alment út.

Eg skal sum frægast royna at svara spurningum tygara og grundgeva fyri tilgongdini.

**Virkisvirðini**
Seinastu tvey árini hevur øll organisatiónin á stovninum, við jøvnum millumbilum, arbeitt miðvíst við at lýsa felags eyðkenni fyri virksemi stovnsins. Vald vórðu 3 virðisorð, sum vit øll ynsktu, skuldi eyðkenna dagliga virki okkara framyvir og sum vit øll kundu taka undir við.

Virðisorðini eru:

- TRYGD (grundleggjandi arbeiðsøki stovnsins)
- TÆNASTA (vendir sær úteftir móti viðskiftafólkum og millum starvsfólk)
- TRIVNAÐUR (vendir sær inn móti organisatiónini og kjarnu viðskiftafólkum)

**Hví nýtt navn og búmerki?**
Sæð í ljósinum av hesum menningararbeiði og tí veruleika, at stovnurin seinastu 10 árini, er broyttur frá at vera ein reinur eftirlitsstovnur, til at vera ein tænastustovnur við fleiri myndugleika uppgávum, sum hava við akfør at gera, hildu vit tað vera rættast, at heita á eina lýsingarstovu, at arbeiða við sjónliggering av virkisvirðunum.

Uppgávan fevndi í fyrsta umfari um sjónliggering av virkisvirðunum, bæði inneftir í organisatiónini og úteftir mótvegis viðskiftafólkunum, herundir møguliga nýtt búmerki og møguliga nýtt navn. Gamla navnið og búmerkið avspegladu ikki verandi virksemi stovnsins, eins og gamla búmerki heldur ikki avspeglaði tann tænastuhuga og opinleika, sum virkisvirðini leggja upp til.

Boðið varð út til navnakapping millum starvsfólkini. Nøkur uppskot komu inn, men onki av hesum varð nýtt.

**Hví ikki boðið alment út?**
Mett varð, at uppgávan skuldi ikki bjóðast alment út, við tað at effektin av tí organisatións-arbeiði, sum longu var gjørt, ikki í sama mun vildi koma til sjóndar í grafiska samleikanum, sum tá ein fyritøka fekk uppgávuna um hendi. Harafturat vildi nýggjheitsvirði í einum møguligum nýggjum navni og búmerki ikki hava somu effekt, um tað framman undan var alment kent, at Bileftirlitið skuldi hava nýtt navn og búmerki.

**Um nýggja búmerki og navnið**

Búmerkið
Kjarnin í búmerkinum er hjólið. Hjólið er á ferð og útstrálar dynamikk og ferðslu. Karmurin um hjólið umboðar tryggu rammurnar og góðkenningarmyndugleikan, ið stovnurin hevur.

Rundu formarnir undirstrika nýggja og meira fyrikomandi profilin.

Navnið
Fyrri liður [ak] umboðar akstur, akfør og ferðslu.

Seinni liður [stovan] umboðar myndugleika, tryggleika, integritet og tænastu.

Nógvar "stovur" eru í Føroyum, t.d. Hagstovan, Tollstovan, Gjaldstovan, Starvsstovan og Búnaðarstovan, ið allar á ein ella annan hátt standa fyri myndugleika og trúvirði.

- Navnið er meiri innbjóðandi og jaligt enn Bileftirlit Føroya
- Lætt at siga og minnast
- Gott føroyskt og ikki ov popput
- Internationalt og webvinarligt (www.akstovan.fo)
- Hóskar til hinar norðurlendsku stovnarnar

**At enda**
Áðrenn nýggja navnið og búmerkið varð almannakunngjørt, vóru starvsfólkini kunnað um úrslitið og uttan undantak dámdu øllum bæði navnið Akstovan og nýggja búmerkið. Tá ið so landsstýrismaðurin hevði góðkent bæði nýggja navnið og búmerkið, varð gongd sett á at broyta bæði prentlutir og telduskipan stovnsins og dagin eftir avdúkingina, arbeiddi stovnurin víðari við nýggja samleika sínum.

Vónandi svarar hetta spurningum tygara. Meira kann lesast á heimasíðuni www.akstovan.fo

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.